# 10. Pangea støddfrøðikappingin 2017

## Millumumfar - 5. flokkur

### Uppgávur, sum geva 3 stig

**1.** Bussar steðga javnan við eitt ávíst steðgipláss.
Tíðin millum tveir bussar er altíð líka long. Nú er klokkan 14:42. Seinasti bussurin fór fyri 5 minuttum síðan, men hann var 3 minuttir seinkaður. Næsti bussurin eigur at fara kl. 14:50.
Nær man næsti bussur fara frá steðgiplássinum?

**a)** kl. 14:58 **b)** kl. 14:55 **c)** kl. 15:00 **d)** kl. 15:05 **e)** kl. 15:06

---

**2.** Hvat tal er tað næsta í raðnum? 2 6 12 20 30 42 56 ☐

**a)** 62 **b)** 66 **c)** 68 **d)** 72 **e)** 76

---

**3.** Her eru fýra uppgávur: 12321 : 3 23432 : 4 45654 : 6 56765 : 7
Í hvussu nógvum av hesum uppgávum er úrslitið eitt heilt tal?

**a)** ongari **b)** júst einari **c)** júst tveimum **d)** júst trimum **e)** júst fýra

---

### Uppgávur, sum geva 4 stig

**4.** Tom fer til fótbóltsdyst við pápa sínum. Pápin sigur við Tom: „Eg havi goldið 224 kr fyri okkum báðar. Hevði eg goldið 40 kr meiri fyri títt atgongumerki, høvdu bæði atgongumerkini kostað tað sama.“
Hvat kostaði atgongumerkið hjá Tom?

**a)** 72 kr **b)** 92 kr **c)** 96 kr **d)** 112 kr **e)** 152 kr

---

**5.** Vit hava 7 sløg av ísi. Turið keypir tríggjar ískúlur.
Hvussu nógvar møguleikar hevur hon, tá ið hon vil hava tvær kúlur av sama slagi, og triðja kúlan skal vera av onkrum øðrum slagi? Tað er líka mikið, hvussu raðfylgjan av kúlunum er.

**a)** 6 **b)** 7 **c)** 21 **d)** 42 **e)** 49

---

**6.** Á einari verksmiðju gera tey 34 súkklur eftir júst 2 tímum. Hvussu leingi eru tey um at gera 119 súkklur?

**a)** 7 tímar **b)** 9 tímar **c)** 11 tímar **d)** 17 tímar **e)** 19 tímar

---

**7.** Arealið á rektanglinum er 12 eindir.
Hvat er arealið á kvadratinum?




**a)** 13 eindir **b)** 16 eindir **c)** 20 eindir **d)** 25 eindir **e)** 36 eindir

---

## Uppgávur, sum geva 5 stig

**8.** Í hesum stuttliga kvadratinum er summurin tvørturum, upp og niður og diagonalt (t.e. eftir hornalinjunum) altíð tann sami. Rokna $\blacktriangle + \blacksquare$.

| | | |
|---|---|---|
| 20 | | 18 |
| 15 | ■ | |
| ▲ | | 14 |

**a)** 30 **b)** 33 **c)** 35 **d)** 38 **e)** 51

---

**9.** Líggjas er tríggjar ferðir so skjótur á súkklu sum Petur er á rulluskoytum.
Klokkan 12:00 fer Petur á rulluskoytum og leggur 7 km afturum eftir 20 minuttum. Klokkan 12:40 fer Líggjas aftaná á súkklu.
Nær fær Líggjas Petur aftur?

**a)** kl. 13:00 **b)** kl. 13:10 **c)** kl. 13:20 **d)** kl. 13:30 **e)** kl. 13:40

---

**10.** Hvør er 2017. bókstavurin í raðnum $PANGEAPANGEAPANGEAPANGEAPANGEA\ldots$?

**a)** $A$ **b)** $E$ **c)** $G$ **d)** $N$ **e)** $P$

---

**11.** Annað av tveimum urum saktar, tvs. gongur ov seint, ein minutt ov seint hvørjar fimm minuttir. Hitt urið fortar, tvs. gongur ov skjótt, ein minutt ov skjótt hvørjar seks minuttir. Bæði urini verða nú sett á klokkan 12:00. Hvussu stórur er tíðarmunurin á hesum báðum urunum, tá ið eitt ur, sum gongur beint, vísir, at klokkan er 14:00?

**a)** 22 min **b)** 24 min **c)** 44 min **d)** 66 min **e)** 84 min

---

**12.** Hvussu nógvar slíkar uppgávur, sí niðanfyri, munnu vera, har restin verður 3?

$$33 : \square = \square \text{ Rest } 3$$

**a)** 1 **b)** 2 **c)** 3 **d)** 4 **e)** 5

---